# vísi ólavsøkudysti





## BOB'ARIN

***Aftast frá vinstur:*** *Hans Jacob Zachariassen, Jón Jacobsen, Remi Olsen, John Hansen, Dan Brimsvík, Poul Andreassen*
***Fremst frá vinstru:*** *Niels Kristian Mikkelsen, Andrias Højgaard, Áki Olsen og Tony Rasmussen.*
*Á myndini vænta: Sigurð Sigurðsson, Hanus Mikkelsen, Eirikur Thomassen og Rúni Brandur Dam*

## NÁMSFERÐ

**Millum tiltøkini hjá Bob'arinum er ein sokalla "Námsferð."**
**Í fjør vóru vit í suðri, har vit millum annað vitjaðu kolanámi, vitjaðu holið í Lopra, lyfti havið í Sumba og annars hugnaðu okkum, sum fólk nú eina ferð gera á námsferð, sigur John Hansen.**

- Hetta er ein sera umráðandi dystur fyri okkum og hann gevur rættindi at háða mótpartin um tú vinnur. Tað kunnu tí gerast nakrar langar 52 vikur, ið standa fyri framman, um tú tapir dystin. Og tí eri eg eisini ein sera vónbrotin maður í kvøld, sigur John Hansen, sum var á tapandi liðnum leygarkvøldið.

### FM í áhugafótbólti

Hvat nú um tað koma fleiri av hesum áhugafeløgunum runt um í Føroyum, hevði tað verið ein møguleiki við einum FM í áhugafelags fótbólti?

- Hatta er ein áhugaverdur tanki, eg havi faktist ikki hugsað um hatta. Eg vil siga, at eg eri ikki avvísandi fyri tankanum, men koma tað fleiri, so hyggja upp á tey og taka eina avgerð harfrá, sigur Finnur Jensen.

### Nevin greiður vinnari

Sjálvur dysturin endaði við 3-0 til Nevan. Hóast Bob'arin nokk hevur fleiri, ið venja ella hava vant fótbólt á høgum støði, so var tað Nevin sum vann. Tað var eisini fitt av fólki, ið vóru komin oman í Gundadal at hyggja eftir heldur forvitnisliga og stuttliga fótbóltsdystinum.

Eftir dystin mátti liðskiparin hjá Bob'aranum, John Hansen, ella Rambo, sum hann verður nevndur millum bob'arnar, ta tungu leið við ferðasteypinum til vinnarnar úr áhugafelagnum Nevin.

- Eg kann bara ynskja Nevanum til lukku við sigrinum í ár, men vit koma sterkt aftur komandi ár, sigur ein sjónliga vónbrotin John Hansen

- Vit takka fyri dystin, men ivast um tit koma sterkt aftur – men tit skulu sjálvandi vera vælkomnir at royna, svarar ein skeivt smílandi og speiskur Finnur Jensen at enda.

## Vit hittast til eitt nú tunnusláttur, yvirskeggja ball og námsferð

- JOHN HANSEN UM TILTØK HJÁ BOB'ARUNUM

## »SLAGSBRØÐUR«



Á Hamrinum á Argjum er eitt húski, ið hevur serliga stóran áhuga í hesum øðrvísi fótbóltsdystinum. Líka-mikið hvussu úrslitið endar, so verður onkur óður í húsi-num. Tí í Viðargøtu standa eini hús, ið hava eitt bein í hvørjum leiðri. 26-ára gamli Óli Olsen er limur í Nevan-um, men yngri beiggin, 22-ára gamli Áki Olsen, er limur í Bob'aranum.

### Óli leggur nógv fyri, meðan Áki ilskast

Tað er eisini týðuligt, at Óli Olsen leggur óvanliga nógv fyri í dystinum hetta leygarkvøldið. Fleiri ferðir liggur maðurin, ið hevur 99-talinum á rygginum, á vøllinum og ger glíðandi taklingar. Vanligar raðfestingar eru útskiftar við djarvar avgerðir, ið skulu tryggja, at Áki og hinir í Bob'arinum ikki skulu fáa mál – kosta hvat tað kosta vil. Á hinum liðnum rennur Áki Olsen runt í síni Manchester United troyggju og sær alsamt meira óður út. Tað lýsir úr andlitsbráðnum á honum, at eitt tap ikki er ein møguleiki í hesum dystinum, men sum dysturin gongur gerst tapið alsamt meiri veruleikakent. Tá bólturin fyri triðju ferð fer um málstrikuna hjá Bob'aranum, er tapið ein staðfesting og Áki Olsen hevur tapt fyri stórabeiggja.

### Mongum brestur ætlan

Eftir dystin skuldu nógvar diplomatiskar sníldur til, fyri at fáa Áka at lata seg avmynda við Óla og steypinum, Áki var skjótur eftir dystin at siga, at hann ikki hevði planir um at tosa við Óla hetta vikuskiftið. Viðmerkingin varð møtt við nógvum látri og harðast flenti Óli. Mongum brestur ætlan og tað gjørdi tað eisini hjá Áka og beiggjarnir báðir fylgdust heim, men nú er tað Óli, ið veruliga er stóribeiggi.